# knar vinnararnar



Myndir: Álvur Haraldsen

Italia og Skotland. Tað er kanska tað besta eitt føroyskt landslið hevur spælt, so dygdirnar eru har, men vit síggja alt ov ofta at útsvingini eru alt ov stór, hugleiðir Jógvan Martin Olsen.

## Taka ikki av

Sermerkt við fleiri av landsliðsleikarunum um aldarskiftið var, at fleiri spældu uttan fyri landoddarnar. Í so máta er eisini nógv broytt. Í dag er tað einans Símun Samuelsen í Keflavík, sum stendur seg millum teir bestu í útlandinum. Aðrir spældu millum teir næstbestu ella velja at venda nøsini aftur móti Føroyum. Og tað undrar landsliðsvenjaran.

– Eg hevði væntað, at fleiri av teimum leikarunum, sum eru millum 25 og 30 í dag, høvdu tikið stigið at fari til eitt nú Danmarkar. Men eg veit, at fleiri av profilunum á landsliðnum vísa aftur tilboðnum frá feløgunum í næstbestu donsku deildini. sigur Jógvan Martin Olsen, sum leggur aftrat, at tað ikki er einasti trupulleikin.

– Nakrir eru heldur ikki nóg góðir har teir koma og megna ikki sláa til, vísir landsliðsvenjarin á.

## Blaðungir seta stór krøv

Sambært Jógvani Martini Olsen geva hesir skarvin yvir, áðrenn teir veruliga hava roynt tað. Og tá er lætt at skifta til smærri felag, har pengarnir hinvegin eru fleiri.

– Og so er tað, at føroyskur fótbóltur lokkar nógv, sigur Jógvan Martin Olsen, sum ikki dugir at siga, um tað eru ov nógvir pengar í føroyskum fótbóltinum.

Í dag síggja vit at blaðungir leikarar eru eisini byrjaðir at seta stór krøv, og tað hóvar als ikki landsliðsvenjaranum.

- Talan er um ungar mans, sum banka upp á hjá feløgum og saman við umboðsmonnum bjóða seg fram, og krevja pengar fyri at spæla uttan at hava prógvað nakað, sigur hann.

Tað eru hesir somu, ið sum ungir tannáringar royndarvenja í útlendskum feløgum. Tað er ikki rætta leiðin, tí heldur skulu vit menna og styrkja umstøður teirra her heima og læra teir at ýta fyrst áðrenn teir byrja at krevja.

– Vit eiga at fyrireika teir nógv betur upp á avbjóðingar, ið standa teimum fyri framman. Serliga kropsliga standa teir als ikki mát við aðrar, vísir landsliðsvenjarin á.

Hann nevnir eisini, at londini, vit kappast við á altjóða leikvøllum, hava lagt nógv meira í fótbóltin, enn vit hava í Føroyum. Tað er eisini ein av orsøkunum, at vit í løtuni renna aftaná hinum. Útskiftingin á føroyska liðnum hevur verið ógvsulig seinastu árini,

## Munur á profilum

Sambært Jógvani Martini Olsen, er tað eisini munur á profilunum fyrr og nú.

– Driblingar í føroysku landskappingini er sum lundi á jólanátt. Tað er líka, tá Hans Pauli Samuelsen tímur. Langskotini sært tú heldur ikki longur, og ein miðvallarleiðara og stríðsmann sum Abraham Løkin finnur tú ikki. Verjuleikarar sum Pól Thorsteinsson, ið kundi draga ferðina úr mótstøðumanninum og verja fyri øllum, eru ov fáir av í dag, slær landsliðsvenjarin fast.

Hann nevnir síðani Marna Djurhuus sum ein, ið hevur hesar eginleikar, men sum ikki er tøkur hjá honum. Og Jóhan Troest Davidsen sum eftir landsliðsvenjarans tykki, hevur nakrar av somu styrkjum.

## Feløg í altjóða framgongd

Tað er sjálvsagt ein meinbogi fyri landsliðið, at føroysku útisetarnir ikki eru fleiri í tali. Tað er hinvegin ein stórur fongur hjá heimligu feløgunum, sum seinnu árini hava staðið seg alsamt betri á altjóða leikpallinum. Men samstundis hevur landsliðið sæð størstu afturgongdina nakrantíð.

– Flestu profilarnir á landsliðnum spæla í Formuladeildini, og tá standa feløgini seg væl, staðfestir landsliðsvenjarin, sum sær ein samanhang millum framgongdina hjá einstøku feløgunum, og at so fáir leikarar leita sær uttalandafyri at spæla.

Men hevði tað tá ikki verið eitt hugskot at kalla útlendskar profilar í føroysku landskappingini upp í landsliðshópin? Menn sum Sorin Anghel og Alex José dos Santos hava jú verið í Føroyum so leingi, at teir kunnu fáa føroyskan borgaraskap.

– Tað er ikki mín uppgáva at geva teimum føroyskan borgaraskap. Tað mugu einstøku útlendingarnir sjálvir fáa í lag. Um tað verður veruleiki at teir vera tøkir at spæla á føroyska landsliðnum, er støðan ein onnur so kundu teir heilt vist verði aktuellir, sigur Jógvan Martin Olsen, sum eisini viðgongur, at tað hevði verið kærkomið, um hesir vóru tøkir at velja ímillum hjá honum.




**Føroyar eru næst vánaligasta landslið í Evropa. Vit hava ikki fingið nakað stig í hvørki EM- ella HM undankapping síðan 2002. Seinastu árini hava vit raplað niður eftir styrkislistanum hjá FIFA. Í løtuni liggja vit nummar 195 - bara 12 lond eru aftan fyri okkum.**

**Sosialurin varpar komandi vikurnar ljós á keðiligu gongdina. Vit leita eftir orsøkunum til, hví tað gongur so illa í hond og spyrja hvat skal til fyri at venda óhepnu gongdini?**

**Vit leggja í dag fyri við Jógvani Martini Olsen, landsliðsvenjara.**

*Lagt til rættis hava...*



Rólant Waag Dam



Uni Holm Johannesen

**Í blaðnum hósdagin verður prátað við Toda Jónsson um sama evni**

